# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

# Phoenix leitar eftir lívi á Mars

**Við hjálp frá millum annað danskari tøkni skal Phoenix kanna, um nakað tekin um lív er at finna á teirri reyðu gongustjørnuni**



*Hetta er ein av teimum fyrstu litmyndunum, sum Phoenix sendi frá Mars í nátt*

*(Mynd: NASA)*

Starvsfólkini hjá amerikonsku rúmdarumsitingini NASA sótu sum á nálum um midnáttarleitið í gjárkvøldið. Rúmdarfarið Phoenix var á veg niður ímóti Mars eftir at hava ferðast 679 milliónir kilometrar frá Jørðini teir seinastu tíggju mánaðirnar.

Eitt radiotekin skuldi siga frá, um farið hevði sett seg í øllum góðum, og spenningurin var stórur teir umleið 15 minuttirnar, sum tað tekur einum radiotekini at ferðast frá Mars til Jørðina. Klokkan 00.53 komu boðini:

### - Phoenix hevur sett seg

NASA hevði fyrireikað ferðina væl og hevði millum annað tikið nógvar myndir av lendingarstaðnum, tí vandi kundi vera fyri, at Phoenix koppaði, tá tað kom niðurat. Lendingarstaðið er í Vastitas Borealis, sum er norðarlaga á gongustjørnuni og nakað norðari, enn Føroyar eru á Jørðini. Vísindafólk halda, at hetta økið hevur verið havbotnur eina ferð í tíðini, og kanningar hava bent á, at ísur kann vera beint undir skorpuni.

### Leitar eftir lívi

Phoenix skal taka fleiri royndir av Mars. Rúmdarfarið hevur serligar armar, sum tað kann grava við, og umborð eru tól, sum kunnu kanna tilfarið og senda úrslitið niður á Jørðina. Tólini kunnu eisini staðfesta, um nakað tekin er um livandi ella deyðar smáverur.

NASA roknar við, at tólini umborð á Phoenix fara at virka í tríggjar mánaðir, eftir at farið hevur sett seg, men hinvegin er tað ikki óhugsandi, at tey kunnu virka í fleiri ár, verður sagt.

Okkurt av tólunum er gjørt í Danmark.

Phoenix-verkætlanin hevur kostað meiri enn tvær milliardir krónur.

# 69 byrgingar kunnu skrædna



*Fleiri av byrgingunum í Sinchuan eru stórar*

*(Mynd: AP)*

**Teir nógvu eftirskjálvtarnir økja vandan fyri, at tær stóru byrgingarnar í Kina skulu skrædna og elva til stóra vatnflóð**

Aftur í gjár var ein eftirskjálvti í Sichuan-landspartinum. Hann var 5,8 á Richter-stiganum , og tað var nóg mikið, til at háhús sveiggjaðu, skrivar AP.

Teir kinesisku myndugleikarnir viðgingu á tíðindafundi í gjár, at teir hugsa meiri um tær stóru byrgingarnar í Sinchuan, tí kanningar hava víst, at ikki færri enn 69 byrgingar kunnu skrædna, um eftirskjálvtarnir halda fram. Vandin gerst uppaftur størri teir næstu dagarnar, tí veðurmenninir siga frá meiri avfalli, sum fer at leggja uppaftur størri trýst á byrgingarnar.

Almenna talið á deyðum eftir tann harða jarðskjálvtan í Sinchuan er farið upp um 60.000, men meiri enn 20.000 onnur eru ikki komin afturíaftur.

## STUTT SAGT

### Russar illir um oljuprísin

Eins og aðrastaðni eru oljan og benzinið dýrkað nógv í Russlandi, og um vikuskiftið mótmæltu fólk um alt landið teimum stóru prísahækkingunum. Útvarpsstøðin Ekko sigur, at í Sankta Pætursborg legði løgreglan uppí, og minst 30 mótmælandi bilførarar vórðu tiknir. Sambært almennu hagtølunum eru oljan og benzinið dýrkað 10 prosent í Russlandi síðani á nýggjárinum, og nógvir russar undrast á, at russiski oljuprísurin skal fylgja prísinum aðrastaðni, tí Russland er heimsins næststørsta oljuframleiðaraland. Teir halda tí, at landið kundi stýrt sínum egna prísi. Tey, sum mótmæltu um vikuskiftið, vístu í hesum viðfangi á, at umleið 70 prosent av tí, sum oljan og benzinið kosta, fer beinleiðis í russiska ríkiskassan sum avgjøld av ymsum slagi.

### Gamal fjallmaður

Í síðstu viku var ein maður á Mount Everest fyri 18. ferð, og so ofta hevur eingin annar verið á heimsins hægsta fjalli. Um vikuskiftið varð aftur eitt met sett á fjallinum. Tað hendi, tá embætismenn í Nepal kunngjørdu, at tann 76 ára gamli Min Bahadur Sherrchan var komin upp á tindin. Sambært embætismonnunum er hann elsti maður, sum hevur verið á Mount Everest, og hann var væl fyri og í góðum hýri, varð sagt. Tað gamla metið sum tann elsti á Mount Everest setti ein 71 ára gamal japani í fjør.



*Mount Everest er 10 ferðir hægri enn Slættaratindur*

*(Mynd: Reuters)*